# Master class við Cathrine Sadolin

SANGSKEIÐ
*Tíðindaskriv*

Í døgunum 23.-25. januar 2004 verður skipað fyri master classs sangskeiði við Cathrine Sadolin í Norðurlandahúsinum. 15 fólk kunnu verða beinleiðis við í undirvísingini, meðan rúm er fyri hópin av áhoyrarum. Cathrine Sadolin er kend frá hópin av sjónvarpssendingum og bókum, har hon lærir fólk at nýta røddina.

Freistin at tekna seg er úti fríggjadagin hin 9. januar 2004. Sangskeiðið er treytað av nóg stórari luttøku og tilmeldingarbløð eru á www.petra.fo

Pláss er fyri 15 aktivum, sum fáa induviduella undirvísing. Ein treyt fyri at kunna luttaka sum aktivur er, at tú ikki ert nýbyrjari og harumframt hevur ein heilt konkretan trupulleika, sum tú vilt hava hjálp til, eitt nú hvussu ein kann náða ein hægri, ella lægri tóna, ikki verða hásur av at halda ein langan fyrilestur, ella syngja eina ávísa strofu. Allir mátar at syngja eru galdandi og vælkomnir, frá heavy til klassiskt. Havið tónleikadømi við á fløgu, so sangurin kann verða greinaður. Takið 1-2 sagir, ella partar av sangi við, har trupuleiki er, umframt nótar og besifringar til pianistin.

Danska Cathrine Sadolin hevur givið út bókina Komplet Sangteknik (Shout Publishing), sum byggir á 15 ára gransking innan allar mátar at syngja uppá. Í hesum arbeiði hevur Sadolin varnast eina higartil ókenda skipan, ið liggur til grund fyri hvussu vit brúka røddina. Bókin og virksemi hennara ger upp við vanahugsan og gongur nýggjar, óvæntaðar leiðir, har møguleiki er at geva øll hugsandi ljóð frá sær - uttan at skaða røddina.

Catherine Sadolin nýtir fýra eginleikar, sum natúrliga eru í øllum røddum. Hesar eginleikar verða nevndir neutral, curbing, overdrive og belting.

Settir saman, fevna hesir eginleikar um allar mátar at syngja, tað verið seg klassiskt ella heavy. Eisini tá umræður distortion, ral, growl, knekk, skríggj, hása rødd, luft í røddini og ornamenterandi teknikk. Verður bygt á ta tøkni, sum Catherine Sadolin nýtir, kunnu allar hesar ræddarvenjingar fremjast á skilagóðan hátt og uttan at skaða virðismiklasta amboð okkara - røddina.

Bók og skeið er ætlað leikum og lærdum, sum av álvara arbeiða við rødd og sangi, tað verið seg sangarar, blásarar, upplesarar, lærarar, læknar, talupedagogar og øll, ið hava trupuleikar av røddini og vilja arbeiða við hesum. Tó hava børn undir 16 ár ikki atgongd til skeiðið. Fyrireikari er Petra Iversen (petra@kallnet.fo) úti á Bø í Kvívík. Meiri kann lesast um Catherine Sadolin á www.sadolin.net/dk <http://www.sadolin.net/dk>



# Peter Pan úr Kunoy



*Anna ur Kunoy hevur seinastu mánaðirnar verið at sæð í høvuðsleiklutinum í sangleikinum um Peter Pan á Århus Teater.*
*Mynd: Jan Jul/Århus Teater*



*Hálvi føroyingurin Anna ur Kunoy er kristin fult og heilt, og hetta hevur ein sera stóran týdning í hennara lívi.*
*Mynd: Jan Jul/-Århus Teater*

**Sjónleikarin Anna úr Kunoy hevur fingið vind í seglini sum sjónleikari í Danmark. Hon er hálvur føroyingur, kristin fult og heilt og hon droymir ikki um at broyta navnið hjá sær, hóast hon ongantíð hevur verið í Kunoy**

PRÀT
*Heri á Rógvi*

Høvuðsleiklutin í stóru uppsetingini av sangleikinum um Peter Pan á Århus Teater hevur Anna ur Kunoy. Men Anna hevur ongantíð verið í Kunoy.

Við einum tílíkum eftirnavni sum hesum, so hava vit sjálvandi við Føroyar at gera. Og Anna er eisini hálvur føroyingur. Pápin kallast Jakob úr Kunoy, og føroyski parturin av hennara familju er úr Norðagøtu. Einar fimm ferðir hevur Anna vitjað í Føroyum, men ongantíð hevur hon verið í Kunoy.

### Sjónleikur

Pápi hennara hevur at kalla alt lívið búð í Danmark, orsakað av at foreldrini fluttu til Danmarkar áðrenn kríggið og sluppu av góðum grundum ikki aftur til Føroya og vóru síðani verandi, tá kríggið varð av.

Anna er í dag tretivu ár hesa seinastu tíðina hevur havt høvuðsleiklutin í sangleikinum Peter Pan á Århus Teater, sum hevur verið framúr væl móttikin.

Hon er uppvaksin í Keypmannahavn. À eftirskúla fær Anna á fyrsta sinni áhuga fyri sjónleiki, og hon søkir og sleppur inn á sjónleikarskúla sum átjan ára gomul í 1992. Fýra ár seinni er hon útbúgvin sjónleikari á Århus Teaterskole.

– Eg var øgiliga ung, tá eg slap inn á sjónleikarskúla og hevði ikki upplivað nógv av lívinum áðrenn. Alt mítt vaksna lív havi eg verið sjónleikari, og tað sigur seg sjálvt, at tað hevur merkt meg, at eg var so mikið ung og visti so lítið til lívið, tá eg byrjaði á sjónleikarskúlanum, sigur Anna ur Kunoy.

Yrkisleiðin sum sjónleikari hevur ført hana til nógvar uppgávur. Hon byrjaði á Svalagangen, sum er eitt leikhús í Århus, og síðani hevur hon arbeitt ymsastaðni í styttri ella longri tíð.

Í løtuni spælir hon fjórða árið á rað barnaleik á Århus Teater. Hóast aldurin er um tey tríati, so kann hon meira enn so nýtast til barnaleikir, og leiklutir sum drongur klárar hon eisini.

– Eg elski at spæla fyri børnum. Haldi eisini leikurin um Peter Pan er so gevandi, hóast hann rýmir til síðst, og leikurin kanska ikki endar so væl, so haldi eg leikurin kann kveikja nakað gott hjá børnunum. Peter Pan flytir til eina dreyma verð av tí at hann kennir seg særdan. Tað er ikki fyrr enn at hann hittir Wendy og harvið kærleikan fyri fyrstu ferð, at hann kemur fyri seg aftur, sigur Anna ur Kunoy.

### Kristin

Um tað hevur nakað við arvaeindina úr Eysturoynni at gera er ikki gott at vita, men í øllum førum hevur kristindómurin ómetaliga stóran leiklut í lívinum hjá Onnu.

– Eg gjørdist kristin fyri sjey árum síðani, og í dag hevur hetta at kalla alt at siga fyri meg. Eg sigi stundum nei til at spæla við í leikum ella filmum, tá eg ikki kann standa inn fyri teimum. Tað skal vera nakað lív í teimum — nakað lívsjáttandi, sigur Anna ur Kunoy.

Tað er sjón fyri søgn, at Anna av fullum huga er kristin. Í skiftingarrúminum hjá henni hevur hon rættað sær eitt lítil altar, sum hon rópar tað, til við livandi ljósum fyri at halda seg nær at gudi. Til dagligt býr Anna, sum hvørki er gift ella eigur nøkur børn, saman við trimum øðrum kristnum í einum húsi í Århus.

– Vit styðja hvønn annan, biðja saman og hjálpa hvørjum øðrum, sigur Anna, ið sum kristin hvørki nýtir rúsdrekka ella spælir kort.

### Vil ikki broyta navn

Hóast hon altso hvørki hevur verið í Kunoy ella dugir føroyskt, so vil hon ikki hoyra talan um at broyta ella sleppa sær av við føroyska eftirnavnið.

– Navnið er á ein ella annan hátt partur av mær. Og eg eri eisini errin av mínari føroysku rótum, sigur Anna ur Kunoy, sum fegin vil heilsa Emmu og Elsu í Norðagøtu.

Hon hevur áður havt eitt millumnavn, men tað varð strikað, men hon er nú einaferð úr Kunoy, og tað verður hon verandi, sigur hon.

Hvussu er og ikki so heldur Anna fyribils fram sum Peter Pan stutta tíð afturat. Tað er ikki heilt greitt, hvat fyri sjónleikarlig avbjóðing stendur fyri framman, men Anna nýtist ikki at keða seg, tí hon er í løtuni í holt við at útbúgva seg sum kirkjusangara, sum sameinir áhuga og yrki fyri hálva føroyingin.

ítróttur

Nr. 3 • mikudagur • 5. januar 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Hans Fróði í sáttmálaklemmu



*Einasti trupulleikin tykist vera, at B68 als ikki er kunnað um skiftið*

**Sambært íslendskum miðlum, hevur Fram – umframt Fróða Benjaminsen – eisini gjørt avtalu um keyp av Hans Fróða Hansen. Trupulleikin í hesum er tó, at B68 einki kennir til málið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Sum vit skrivaðu í gjár, so fer toftamaðurin, Fróði Benjaminsen, komandi kappingarárið at royna seg í íslendskum fótbólti, har hann hevur gjørt sáttmála við Fram í Reykjavík. Tá skrivaðu vit eisini, at íslendingarnir eisini hava sýnt áhuga fyri Hans Fróða Hansen, og sambært heimasíðuni hjá Fram, so er hetta nú meira enn bara áhugi.

Her stendur nevnliga, at felagið hevur gjørt trý ára sáttmálar við bæði Fróða og Hans Fróða, og verða teir báðir annars bodnir at vera væl komnir í felagið.

### B68 veit einki

Soleiðis tykist alt vera komið í rættlag við skiftinum, men har er tó ein trupulleiki, sum ikki er loystur.

Á Toftum vita tey nevnliga einki sum helst um skiftið, og tá vit týsmorgunin tosaðu við formannin í felagnum, Niclas Davidsen, var hann sera bilsin um at hoyra, hvat íslendingarnir vistu at siga um hetta.

- Eg má bara siga, at hatta kenni eg einki til. Fram hevur verið í sambandi við okkum um Hans Fróða, men enn er ikki tikin støða til, hvat víðari hendir í hesum, var einasta viðmerkingin, sum formaðurin hevði til hetta.

### Í stríð við reglurnar

Hóast vit dúgliga royndu at fáa fatur á Hans Fróða Hansen, so eydnaðist tað okkum framvegis ikki at koma í samband við hann, men tær báðar mótstríðandi útsagnirnar frá Fram og B68 benda í øllum førum greitt á, at hetta verður eitt skifti við stórum trupulleikum.

Tá Hans Fróði kom aftur til Føroya eftir at hava roynt seg í norskum fótbólti, var tað soleiðis, at toftamenn máttu keypa hann leysan úr sáttmálanum frá Sogndal. Hvussu stór upphæddin fyri hetta var, hevur ikki eydnast okkum at fáa uppspurt, men sum skilst var talan um eina – eftir føroyskum mátistokki – stóra upphædd.

Afturfyri hetta, so tryggjaði B68 sær tó, at talan gjørdist um ein langan sáttmála, og tað merkti í seinasta enda, at Hans Fróði tá skrivaði undir ein fýra ára sáttmála, og enn er so eitt ár eftir av hesum.

Tað merkir við øðrum orðum, at Hans Fróði Hansen sambært bindingunum av sáttmálanum við B68 als ikki hevur loyvi at samráðast við annað felag, uttan so at B68 er partur av hesum samráðingum. Hartil siga galdandi FIFA-reglur, at eitt felag ikki kann seta seg beinleiðis í samband við leikara, uttan so at hesin hevur í mesta lagi hálvt ár eftir av sáttmála sínum



*Íslendska Fram hevur á heimasíðu sínari boðað frá, at teir hava gjørt 3-ára sáttmála við Hans Fróða Hansen*

## Revsingin kann verða hørð

Sum umrødda málið liggur í løtuni, so bendir alt á, at bæði Hans Fróði Hansen og íslendska Fram hava gingið uttan um galdandi sáttmálar á økinum. Og sambært teimum reglum, sum FIFA hevur á økinum – og sum FSF eisini gongur undir – so kann hetta í ringasta føri viðføra harða revsing fyri bæði felag og leikara.

FSF-reglurnar fyri leikarasáttmálar siga, at um so er, at leikari brýtir sáttmála, so hevur felag hansara møguleika at krevja endurgjald, sum svarar til higartil útgoldnu lønina í sáttmálaskeiðnum umframt tær positivu útreiðslur, sum felagið hevur havt av leikaranum.

Hetta vil við øðrum siga, at B68 kann krevja antin Hans Fróða Hansen, ella íslendska Fram eftir eini upphædd, sum svarar til ta løn, sum leikarin tey fyrstu trý árini av sáttmálanum hevur fingið útgoldið umframt keypspeningin, sum B68 í síni tíð rindaði norska Sogndal fyri leikaran.

Bara hetta í sjálvum sær kann helst gerast ein munandi upphædd, men hartil hevur FIFA eisini møguleikar at revsa bæði leikara og nýggja felag hansara.

Fyri leikara er galdandi, at hann kann verða dømdur at rinda eina bót fyri brot á sáttmálareglurnar, umframt at FIFA eisini kann geva boð um, at leikarin ikki kann hava spæliloyvi í nøkrum FIFA-landi í ávíst tíðarskeið.

Fyri felagið - altso Fram – er galdandi, at tey eisini kunnu fáa bót, og hartil kann FIFA gera av, at felagið í ávíst tíðarskeið ikki hevur loyvi at gera nýggjar leikarasáttmálar.

Okkum kunnugt er málið tó ikki koyrt nakran veg til hvørki FSF ella FIFA enn, men spurningurin er, hvat hendir, nú leysasøgurnar um møguliga skiftið eru staðfestar av keypandi felagnum. Og lítið er at ivast í, at enn er seinasta orðið ikki sagt í málinum.

jm